# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.:<br>10/00044 | Lóg:<br>Kapitalvinningsskattalógin § 9<br>Norðurlendski tvískattasáttmálin<br>§ 10, § 25 | Avgerð tikin:<br>07.04.2011 |
|---|---|---|

## Kapitalvinningur. Vinningsbýti. Norðurlendski tvískattasáttmálin.


**Samandráttur:**

**Kært er um álíkningina av kapitalvinningsskatti fyri 2008. Kærarin hevur frá útlendskum felag fingið vinningsbýti, sum er skattað bæði í Føroyum og í Danmark.**
**Sambært grein 10, stk. 1 í tvískattasáttmálanum kann vinningsbýtið hjá kæraranum skattast í Føroyum. Tað skilst tó av grein 10, stk. 3 í tvískattasáttmálanum, at hetta vinningsbýti eisini kann skattast í Danmark, tó má skatturin ikki fara upp um 15% av kr. 11.632, sum er kr. 1.744,88.**
**Sambært grein 25, stk. 2, litra a í tvískattasáttmálanum skal TAKS geva frádrátt í skattinum fyri kr. 1.744,88, sum er tann skattur, sum danski staturin kann uppkrevja vísandi til grein 10, stk. 3 í tvískattasáttmálanum. Kærarin skal tí gjalda kr. 4.071,37 – kr. 1.744,88 = kr. 2.326,49 til TAKS. Avgerðin hjá TAKS varð staðfest.**
**Viðmerkt er, at trupulleikin í hesum máli er, at danski staturin hevur kravt ov nógvan skatt av tí umrødda vinningsbýtinum vísandi til grein 10, stk. 3 í tvískattasáttmálanum. Eitt møguligt krav eftir ov nógv goldnum skatti av vinningsbýtinum skal tí rættast móti SKAT í Danmark.**


### Avgerð

**Kært er um** álíkningina av kapitalvinningsskatti fyri 2008.

Kærarin hevur fingið vinningsbýti frá útlendskum felag, sum er skattað bæði í Føroyum og í Danmark. Kærarin førir fram, at hann hevur goldið ov nógvan skatt av vinningsbýtinum í Føroyum.

**Kæran**
Kærarin vísir til skjøl, sum eru hjáløgd kæruni, og førir fram, at honum er álagt at gjalda ein skatt á 35,55% av vinningsbýtinum av partabrøvunum hjá sær.

Øll partabrøvini hjá kæraranum eru á goymslu hjá EIK. Við útgjaldi av vinningsbýti frá útlendskum feløgum (kr. 11.632,50) er afturhildið 28% (kr. 3.257,10) í kapitalvinningsskatti til danska statin. Eftir umsókn frá kæraranum hevur Skat í Danmark tann 21. november 2008 afturgoldið kr. 1.447,88.

Tann 9. juni 2009 kravdi TAKS kæraran eftir kr. 2.326,53. Um kapitalvinningsskatturin í Føroyum er 35%, eigur hetta kravið ikki at vera hægri enn kr. 2.262,15, ein upphædd, sum var flutt TAKS tann 22. juni 2009.

Við mótrokning í avlopsskattinum fyri 2008 hevur TAKS tann 18. september 2009 inndrigið kr. 65,00, og hetta er upphæddin, sum hendan kæran snýr seg um.

**TAKS**
Kærarin hevur fingið uppgerð av kapitalvinningi dagfest 9. juni 2009 við teimum upplýsingum, sum frammanundan eru sendar TAKS frá peningastovnum.

Uppgivið er kr. 11.632,50 frá útlendskum felag, og samanlagda skattskylduga kapitalvinningsinntøkan er kr. 14.423,58.

| | |
|---|---|
| Útroknaði kapitalvinningsskatturin er 35% av kr. 14.423,58 | kr. 5.048,25 |
| Goldin skattur av rentu og vinningsbýti í Føroyum er | - 976,48 |
| Útroknaður frádráttur av skatti uttanlands er 15% av kr. 11.632,50 | - 1.744,88 |
| Kapitalvinningsskattur at gjalda er | kr. 2.326,53 |

Vísandi til omanfyristandandi og avrit av kapitalvinningsuppgerð fyri 2009 hevur TAKS álíknað 35%, sum er ásett í § 14, stk. 2 í lóg um skatting av kapitalvinningi.

Sambært tvískattasáttmála millum Norðurlond § 10, stk. 3 kann landið, har útgjaldandi felagið er skrásett, skatta vinningsbýti, men skatturin má ikki fara upp um 15% av vinningsbýtinum. Í skipanini hjá TAKS er tí lagt eitt filtur, sum ásetir frádrátt fyri útlendskan skatt eftir hesum. Frádrátturin fer tí ongantíð upp um 15%, og skattaborgarin skal gjalda munin, 20%, í Føroyum.

Í Føroyum fær kærarin tí frádrátt fyri kr. 1.744,88 og kann søkja um at fáa ov nógv goldið aftur frá donsku skattamyndugleikunum.

Munurin í hesum føri skuldi verið kr. 1.512,22.

Kærarin sigur, at hann hevur móttikið kr. 1.447,88 frá Skat í Danmark og tí hevur goldið kr. 1.809,22. Hann heldur, at hann hevur fingið kr. 65,00 ov lítið í frádrátti.

Vinningsbýti kann skattast í tí ríkinum, har felagið, sum rindar vinningsbýtið, er skrásett. Henda skatting kann ikki fara upp um 15% av bruttoupphæddini. Tá tað er ásett, at vinningsbýtið kann verða skattað í keldulandinum, skulu Føroyar geva kreditlinking fyri 15%, ið eru goldin í keldulandinum. Víst verður til § 25, stk. 2, litra a.

Vísandi til kæruna hevur Danmark afturhildið 28% í kapitalvinningsskatti. Kærarin skuldi sostatt fingið 13% afturgoldið úr Danmark. Við øðrum orðum hevur hann goldið kr. 65,00 ov nógv til Danmarkar.

Kærarin er álíknaður 35% av kapitalvinningi, og hann hevur fingið frádrátt fyri 15%. Hann skal tí gjalda kr. 2.326,53, sum er 20% av vinningsbýti frá útlendskum felag. TAKS metir tí, at skattingin er farin fram sambært galdandi reglum.

**Avgerðin hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini**
Sum málið er upplýst, má kærarin metast at vera fult skattskyldugur í Føroyum, jb. § 1 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (skattalógin).

Vinningsbýtið skal roknast við í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni eftir § 14, jb. § 1, stk. 1, nr. 5, § 9 í løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 (kapitalvinningsskattalógin), og vísir uppgerðin ein vinning, skal skattur latast upp á 35% av hesum vinningi, jb. § 14, stk. 2 í somu lóg.

Samanumtikið skal viðmerkjast, at tá inntøkan er skattskyldug í Føroyum, og kærarin er fult skattskyldugur í Føroyum, skal kærarin sum útgangsstøði gjalda kapitalvinningsskatt av vinningsbýtinum frá útlendskum felag til Føroyar.

Sum tað skilst av málinum, hevur danski staturin tó eisini rætt til at skatta hesa inntøku, og sáttmálin millum tey norðurlendsku londini at sleppa undan tvískatting verður tí relevantur í hesum máli.

Tað sæst av grein 10, stk. 1 í tvískattasáttmálanum, at vinningsbýti, sum felag, ið er skrásett í einum sáttmálabundnum ríki, rindar til ein persón, sum er heimahoyrandi í einum øðrum sáttmálabundnum ríki, kan verða skattað í seinna nevnda ríkinum.

Sambært hesi áseting kann vinningsbýtið hjá kæraranum skattast í Føroyum.

Tað skilst tó av grein 10, stk. 3 í tvískattasáttmálanum, at hetta vinningsbýti eisini kann verða skattað í tí sáttmálabundna ríkinum, har tað felagið, ið rindar vinningsbýtið, er heimahoyrandi, og eftir lóggávu, sum har er galdandi, men skatturin, ið verður álíknaður, má ikki fara upp um 15% av bruttoupphæddini av vinningsbýtinum, um rætti eigari er ein persónur búsitandi í hinum sáttmálabundna ríkinum.

Sambært hesi áseting kann vinningsbýtið hjá kæraranum eisini skattast í Danmark, tó má skatturin ikki fara upp um 15% av 11.632 kr., sum er 1.744,88 kr.

Tað skilst av grein 25, stk. 2, litra a í tvískattasáttmálanum, at um so er, at persónur, búsitandi í Føroyum, fær inntøku, sum sambært ásetingunum í hesum sáttmála kann verða skattað í einum øðrum sáttmálabundnum ríki, skulu Føroyar, uttan so at ásetingarnar í litra b) ella c) niðanfyri áseta annað, loyva frádrátt í føroyska inntøkuskattinum hjá hesum persóni við eini upphædd, sum svarar til tann inntøkuskatt, ið er goldin í hinum ríkinum. Frádrátturin skal tó ongantíð fara upp um tann partin av føroyska inntøkuskattinum, roknaður áðrenn slíkan frádrátt, ið verður goldin av tí inntøku, ið kann verða skattað í hinum ríkinum.

Sambært hesi áseting skulu Føroyar loyva skattafrádrátt fyri tann skattin, sum kærarin skal gjalda til danska statin, tvs. kr. 1.744,88. Viðmerkjast kann, at Føroyar her skulu loyva frádrátt fyri tann skattin, sum kærarin sambært reglunum skal gjalda danska statinum, og ikki tann skattin, sum kærarin veruliga hevur goldið til tann danska statin.

Grundað á omanfyri standandi kann viðmerkjast, at kærarin sum útgangsstøði skal gjalda 35% í kapitalvinningsskatti av kr. 11.632,50 frá útlendskum felag til TAKS, sum er kr. 4.071,375 jb. § 1, stk. 1, nr. 5, § 9 og § 14, stk. 2 í kapitalvinningsskattalógini.

Sambært grein 25, stk. 2, litra a í tvískattasáttmálanum skal TAKS geva frádrátt í skattinum fyri kr. 1.744,88, sum er tann skattur, sum danski staturin kann uppkrevja vísandi til grein 10, stk. 3 í tvískattasáttmálanum.

Kærarin skal tí gjalda kr. 4.071,375 – kr. 1.744,88 = kr. 2.326,495 til TAKS.

**Vísandi til omanfyri standandi hevur Skatta- og avgjaldskærunevndin avgjørt at staðfesta avgerðina hjá TAKS.**

Viðmerkjast kann, at trupulleikin í hesum máli er, at danski staturin hevur kravt ov nógvan skatt av umrødda vinningsbýtinum vísandi til grein 10, stk. 3 í tvískattasáttmálanum. Eitt møguligt krav eftir ov nógv goldnum skatti av vinningsbýtinum skal tí rættast móti SKAT í Danmark.